TÓRSHAVNAR KOMMUNA

**torshavn.fo/hoyringar**

# Broyting av almennu byggisamtyktini og serstøk byggisamtyktini fyri vinnuøkið á Ovara Hjalla

Tórshavnar býráð samtykti á fundi 27. februar og 5. mai 2025 uppskot um at broyta almennu og serstøku byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 139a Hoyvík, í sambandi við ger av vinnuútstykking í økinum.

- Broytingin av almennu byggisamtyktini snýr seg um at víðka vinnuøkið eystureftir, uml. 33.000 $m^2$, umframt at broyta part av B4 vinnuøkinum, ætlað til vinnuvirkir, til B7 øki, ið er ætlað til smærri vinnuvirkir.
- Broytingin av serstøku byggisamtyktini snýr seg um at broyta øki B til smærri vinnuvirkir, soleiðis at tað samsvarar við almennu byggisamtytkina fyri økið, umframt at skapið á tí eina stykkinum, beint við innkoyringina til økið, verður broytt.

Tilfar, sum lýsir uppskotið at broyta almennu og  serstøku byggisamtyktina, liggur frammi á torshavn.fo og í Snarskivuni frá 6. juni 2025 til 18. juli 2025.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu sendast Tórshavnar kommunu skrivliga til torshavn@torshavn.fo í seinasta lagi 18. juli 2025.




